FØROYA STIFTSSTJÓRN

# PRESTA- OG DÓMPRÓSTASTØRV Í FØROYSKU FÓLKAKIRKJUNI

## SJÓVAR PRESTAGJALD

Søkt verður eftir sóknarpresti til Sjóvar prestagjald í Eysturoynni. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og sóknarpresturin er tænastumaður.

Umsøkjarin má rokna við møguligum broytingum í kalli og starvi samsvarandi tænastumannalógini og lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.

Lønin er samsvarandi semju dagfest 8. juni 2009 millum Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið, har sóknarprestar verða løntir frá stigi 28,1 – 36,1

Sóknarpresturin hevur ábyrgd av kirkjubókunum (høvuðs- og kopibókini) og er jarðarferðarmyndugleiki. Embætið verður sett 1. februar 2010.

Í prestagjaldinum eru fýra kirkjusóknir: Selatraðar, Sjóvar, Skála og Oyndarfjarðar kirkjusókn. Umleið 1.920 fólk búgva í prestagjaldinum.

Tænastubústaður er til starvið. Prestagarðurin er Innan Glyvur, á Gjaranesi, Glyvursvegur 26. Sóknarpresturin hevur skyldu at búgva í prestagarðinum.

## SUÐURSTR. VESTARA PRESTAGJALD

Søkt verður eftir sóknarpresti til Suðurstreymoyar vestara prestagjald. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og sóknarpresturin er tænastumaður.

Umsøkjarin má rokna við møguligum broytingum í kalli og starvi samsvarandi tænastumannalógini og lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.

Lønin er samsvarandi semju dagfest 8. juni 2009 millum Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið, har sóknarprestar verða løntir frá stigi 28,1 – 36,1

Hetta embætið er tað triðja í prestagjaldinum. Tænastan verður skipað í samstarvi prestanna millum. Embætið verður sett 1. februar 2010.

Í prestagjaldinum eru fýra kirkjusóknir: Hests, Kirkjubøar, Argja og Tórshavnar vestara kirkjusókn. Umleið 9000 fólk búgva í prestagjaldinum.

Eingin tænastubústaður er til starvið. Einki ískoyti verður veitt sum viðurlag fyri vantandi bústað.

## NORÐSTREYMOYAR PRESTAGJALD

Søkt verður eftir sóknarpresti til Norðstreymoyar prestagjald við sæti í Kvívík. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og sóknarpresturin er tænastumaður.

Umsøkjarin má rokna við møguligum broytingum í kalli og starvi samsvarandi tænastumannalógini og lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.

Lønin er samsvarandi semju dagfest 8. juni 2009 millum Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið, har sóknarprestar verða løntir frá stigi 28,1 – 36,1

Sóknarpresturin hevur ábyrgd av kirkjubókunum (høvuðs- og kopibókini) og er jarðarferðarmyndugleiki. Starvið verður skipað í samvinnu við hinar báðar prestarnar í prestagjaldinum. Embætið verður sett 1. februar 2010.

Í prestagjaldinum eru átta kirkjusóknir: Tjørnuvíkar, Haldórsvíkar, Hvalvíkar, Saksunar, Hósvíkar, Kollafjarðar, Kvívíkar og Vestmanna kirkjusókn. Umleið 3.900 fólk búgva í prestagjaldinum.

Tænastubústaður er til starvið. Prestagarðurin er í Kvívík, á Kirkjuteigi, Kirkjuvegur 24. Sóknarpresturin hevur skyldu at búgva í prestagarðinum.

## SUÐURSTR. EYSTARA PRESTAGJALD

Søkt verður eftir sóknarpresti til Suðurstreymoyar eystara prestagjald. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og sóknarpresturin er tænastumaður.

Umsøkjarin má rokna við møguligum broytingum í kalli og starvi samsvarandi tænastumannalógini og lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.

Lønin er samsvarandi semju dagfest 8. juni 2009 millum Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið, har sóknarprestar verða løntir frá stigi 28,1 – 36,1

Hetta embætið er tað triðja í prestagjaldinum. Tænastan verður skipað í samstarvi prestanna millum. Embætið verður sett 1. februar 2010.

Í prestagjaldinum eru fýra kirkjusóknir: Nólsoyar, Kaldbaks, Hoyvíkar og Tórshavnar eystara kirkjusókn. Umleið 9.600 fólk búgva í prestagjaldinum.

Eingin tænastubústaður er til starvið. Einki ískoyti verður veitt sum viðurlag fyri væntandi bústað.

SOSIALURIN 341800

## NORÐOYA VESTARA PRESTAGJALD

Søkt verður eftir sóknarpresti til Norðoya vestara prestagjald. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og sóknarpresturin er tænastumaður.

Umsøkjarin má rokna við møguligum broytingum í kalli og starvi samsvarandi tænastumannalógini og lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.

Lønin er samsvarandi semju dagfest 8. juni 2009 millum Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið, har sóknarprestar verða løntir frá stigi 28,1 – 36,1

Sóknarpresturin hevur ábyrgd av kirkjubókunum (høvuðs- og kopibókini) og er jarðarferðarmyndugleiki. Tveir prestar røkja tænastuna, og starvið verður skipað í samstarvi prestanna millum. Embætið verður sett 1. februar 2010.

Í prestagjaldinum eru fimm kirkjusóknir: Árnafjarðar, Kunoyar, Klaksvíkar, Húsa og Mikladals kirkjusókn. Umleið 5000 fólk búgva í prestagjaldinum.

Tænastubústaður er til starvið. Prestagarðurin er í Klaksvík, á Brekku 5. Sóknarpresturin hevur skyldu at búgva í prestagarðinum.

## SUÐURSTR. EYSTARA PRESTAGJALD

Embætið sum Dómpróstur Føroya er lýst leyst at søkja. Dómprósturin er tænastumaður. Lønin er samsvarandi semju dagfest 8. juni 2009 millum Fíggjarmálaráðið og Prestafelagið, har dómprósturin er løntur í lønarflokki 39.

Kallið nemur tvinni atlit. Dómprósturin er umsitingarligur leiðari í fólkakirkjuni og sóknarprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi við ábyrgd av kirkjubókum og jarðarferðarmyndugleiki.

Í prestagjaldinum eru fýra kirkjusóknir: Nólsoyar, Kaldbaks, Hoyvíkar og Tórshavnar eystara kirkjusókn. Umleið 9.600 fólk búgva í prestagjaldinum.

Tænastubústaður er til starvið. Dómpróstagarðurin er í Tórshavn, Essalág 18. Dómprósturin hevur skyldu at búgva í dómpróstagarðinum.

Afturat kirkjunum eru onnur tænastustøð. Gudstænastur verða hildnar á ellis- og røktarheimi og sambýlum.

Umsøkjarar skulu hava lokið prógv í gudfrøði og lúka krøvini, ið lóggávan annars setir fyri at gerast prestur í fólkakirkjuni í Føroyum. Umsøkjarar, ið ikki eru prestvígdir, senda váttan frá pastoralseminarium saman við umsóknini.

Eru fyrispurningar ella ivamál, so eru tygum vælkomin at ringja ella skriva. Telefon 311995 ella jf@folkakirkjan.fo

**Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 10. desember 2009, kl. 15.00. stift@folkakirkjan.fo**

**Umsóknin verður send til:**

Føroya Stiftsstjórn
J. Paturssonargøta 20
Postsmoga 8
FO-110 Tórshavn

sigillum episcopi færoensis